

*Talan var um fjølbroytt úrval, tá Kvennakós Kópavágs vitjaði í Klaksvík*

# Kvennakór Kópavágs var á vitjan í Klaksvík síðsta sunnudag

Kórið er ungt, bert trý ár og er hetta fyrista ferðin uttanlands hjá kórinum. Tær sungu í Christianskirkjuni sunnudagin kl 16.00, har heilt væl av fólki hevði leita sær til at lurta.

Kvennakór Kópavogs sungu fjølbroytt úrval, bæði innan kirku- fosturlands- og popsang. Løg frá Íslandi, Korea, Mexico, Ruslandi og eisini Beatles, Paul Simon, og Andrew Lloyd Wedder høvdu smíðað tónleikin til tað breiða úrvalið, sum tær 32 damurnar sungur sera hegnisliga.

Kvøða til Klaksíkar eftir Bernhard Brim við lag eftir Sigfús Halldórsson sungu tær eisini - Tí vildi tær eftir konsertina eisini fáa at vita: "hvar er Oyrafjall"??

Tær megnaðu væl sangin, so ymiskur hann var. Við á ferðini vórur tær útbúnar sangarinnur: Sigríður Sif Sævarsdíottir, sopran og Inga Sæmundsdóttir, alt.

Kópavogur er sum kunnugt vinarbýur Klaksvíkar, og stóð ferðin annars eisini í hesum ljósinum. Tær fingu gávu frá býráðnum umframt sjálvandi Klaksvíks-nálina. Tað vóru enn fleiri vinarbond knýtt og enn fleiri teldupostadressur komu á yvirlitið.


Lesið Sosialin -so eru tit við!






## Heimsgitna Jane Verity til Føroya

**Skeið um Demens á Hotel Hafnia 1. og 2. juni 2005**

"Tú kanst tendra lívsneistan aftur hjá fólkum við demens."

Tað er ein av boðskapunum á skeiðnum, sum Alzheimerfelagið skipar fyri á Hotel Hafnia 1. og 2. juni. Skeiðið er ætlað fólkum, sum arbeiða innan eldraøkið.

Tað er tann viðurkendi ergo- og familjuterapeuturin Jane Verity, ið hevur skeiðið. Hon hevur stovnað ráðgevingarmiðstøðina "Dementia Care Australia", sum hon eisini er leiðari fyri. Hon er høgt í metum og nógv eftirspurd sum fyrilesari. Hon er fødd í Danmark, og undirvísingin fer fram á donskum.

Hennara fyrilestrar eru merktir av hennara brennandi áhuga fyri menniskjum við demens. Hon megnar at geva luttakarunum nýggj hugskot og íblástur til at tora at ganga nýggjar leiðir innan økið. Hon sær demenstrupulleikan úr einum øðrum og óvanligum sjónarhorni og stríðist fyri at broyta almenna hugburðin til sjúkuna.

Skeiðið byggir á hennara hugsjón, ið er grundað á fatanina, at til ber at kveikja lívsneistan aftur hjá fólkum við demens, hjá avvarðandi teirra og hjá teirra hjálparfólkum.

**Skráin 1. og 2. juni kl. 9-15**

**1. juni: Nýggja demensmentanin**
Í staðin fyri at seta fokus á demens, verður sett fokus á allan persónin. Við at fokusera á allan persónin kunnu vit betur hjálpa menniskjum við demens.

**2. juni: Lær at skilja og samskifta við fólk, ið hava sjúkuna demens**
Hendan dagin fáa luttakaranir innlit í, hvørjar persónligar grundgevingar liggja aftan fyri alt tað, ið ein persónur við demens ger. Samstundis læra vit um torføra samskiftið við persónar við demens. Vit læra, hvussu teir kunnu læra at minnast betur, og hvussu teir framvegis kunnu velja sjálvir.

Skeiðkostnaður 2000 kr. við morgunmati, døgurða og kaffi.

Tilmelding við telduposti í seinasta lagi 21. mai.

**Skriva til**
flesin@post.olivant.fo ella sigmo@post.olivant.fo. Eru spurningar, kanst tú ringja á telefon 214383.

**Almennur fyrilestur**

Á føroyaferðini hjá Jane Verity er eisini ein fyrilestur fyri almenninginum á skránni. Hann verður 3. juni klokkan 19 í hølunum hjá Føroya Tele. Kostnaður 50 krónur.

"Lær at síggja við hjartanum" er heiti á almenna fyrilestrinum. Hetta er nýtt sjónarmið um demens.

SANSIR TEL 355 355

ALZHEIMER felagið

www.alzheimer.fo